# Volvo City Safety



City Safety skipanin ansar eftir ferðsluni framman fyri bilin við hjálp av einum optiskum radara í forrútinum

**Volvo Cars eru millum teir fremstu við aktivum trygdarskipanum, sum hjálpa bilføraranum við at umgangast skaðar. Tann nýggjasta er "City Safety", ið kemur á marknaðin einaferð í 2007**

BILAR

Næsta ár koma Volvo Cars við eini skipan, sum viðvirkar til at umgangast samanstoytir við lítlari ferð, sum t.d. undir býarkoyring, tá bilar standa í longum røðum, og ferðslan gongur spakuliga.

Um bilurin framman fyri knappliga steðgar, og "City Safety" metir, at møguleiki er fyri samanstoyti, fyrireiker skipanin bremsurnar, soleiðis at tær bremsa í sama eygnabragdi bremsupedalin verður aktiverað. Metir skipanin har afturímóti at samanstoyturin er óumgongiligur, bremsar bilurin av sær sjálvum.

Volvo Cars vænta at "City Safety" verður til fyrimun fyri allar partar, bæði hjá teimum sum hava skipanina og hjá øðrum í ferðsluni, sum t.d. hjá teimum sum koyra framman fyri ein bil við hesi skipan, har møguleikin fyri buglum og "whiplash-skaðum" verður munandi minni.

"City Safety" er optisk radarskipan, ið situr í forrútinum í somu hædd sum bakkspeglið, og ansar eftir ferðsluni framman fyri bilin.

Skipanin registrerar akfør sum eru upp til seks metrar framman fyri bilin.

# Ford Fiesta 30 ár

**Ford kunnu í ár hátíðarhalda at 30 ár eru liðin síðan fyrsti Ford Fiesta koyrdi av samlibandinum í Valencia í Spania í 1976**

BILAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



Ford Fiesta frá 1976 og frá 2006. Ford kunnu í ár hátíðarhalda at Fiesta hava 30 ár á baki

Ford Fiesta var frá byrjan av, tíðliga í 70-unum, ein personlig ætlan hjá Ford stjóranum Henry Ford II, sum legði stóran dent á at framleiða smáar bilar, og Ford Fiesta skuldi verða ein bilur til allan heimin. Henry Ford II var sjálvur við í øllum fyrireikingunum, tá nýggja bilverksmiðjan varð tikin í nýtslu í Valencia í Spania í mai 1976.

Frá byrjan varð Fiesta gjørdur við trimum ymiskum motorum: 1,0 litur við einans 40 HK, og tveimum 1,1 litur motorum við ávikavist 45 og 53 hk. Í luksusútgávuni Ghia, vóru Fiesta teir best útgjørdu bilarnir í sínum klassa.

Fiesta var tann fyrsti Ford, ið hevði tvørliggjandi motor og varð drivin av forhjólunum. Størstu kappingarneytarnir tey fyrstu árini vóru Renault 5 og VW Polo.

Sereyðkenni fyri Fiesta var, at hann var økonomiskur og lættur (vigaði einans 700 kg) og hevði størsta viðførisrúm í sínum klassa. Bilurin fekk eisini nógvar heiðurslønir tey fyrstu árini.

Gjøgnum árini fingu Fiesta fleiri ferðir "facelift" og umfatandi broytingar til 2001, tá ein heilt nýggjur Fiesta kom á marknaðin. Hesin verður gjørdur bæði í Valencia, saman við Mazda2, og í Køln í Týsklandi.



Fyrsti Fiesta koyrdi av samlibandinum í Valencia í Spania í 1976

